# Tvey »pør« við nógvum upsa í Saltangará

**Seinastu vikuna hava nøkur skip landað upsa á landingarmiðstøðini hjá Beta í Saltangará**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Mánadagin løgdu leirvíkstrolararnir, Stjørnan og Polarhav, eini 260.000 pund upp í Saltangará. Meginparturin av veiðini hjá skipunum var upsi.

Váðasteinur, sum er á línuveiði, landaði eisini í Saltangará mánadagin. Tá ið vit frættu av landingarmiðstøðini hjá Beta, sótu tey ikki við ítøkiligu landingartølunum hjá Váðasteini við hondina, men sum skilst, hevði línubáturin eitt sindur av hvørjum.

Skipini hjá Beta, Bakur og Stelkur, landaðu í Saltangará seinasta hósdag – ella fyri eini viku síðan, og tá høvdu tey tilsamans 320.000 pund, meginparturin upsi.

Garnaskipið Nim hevur eisini landað í Saltangará nýliga.

**Frægari fiskur – og betri prísur**

Ragnar S. Olsen, reiðari, veit at siga, at hóast upsin framvegis er smáttfallandi, er hann frægari til støddar nú, enn tá ið hann var smæstur.

Upsaprísurin er eisini batnaður munandi, sum árið er liðið, og í dag fáa skipini einar 4,50 til 5 krónur fyri kilo.

Nú upsin er so stórur partur av tilfeinginum, sum ísfiskaskipini føra til lands, hevur økti prísurin stóran týdning fyri ísfiska-trolararnar, sum hava ligið tungir í sjónum seinastu tíðina.



*Mánadagin høvdu leirvíkstrolararnir 260.000 pund av upsa, og fyri eini viku síðan høvdu Bakur og Stelkur 320.000 pund*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Ruðuleiki á føroyska arbeiðsmarknaðinum

**– Nakrir lyklapersónar leggja samfelagið lamið næstan hvørja ferð, samráðingar eru. Hetta ber stutt sagt ikki til, heldur Vinnuhúsið á heimasíðuni**

ARBEIÐSMARKNAÐUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum halda tey, at føroyski arbeiðsmarknaðurin er ov illa skipaður, og hetta hevur Føroya Arbeiðsgevarafelag fleiri ferðir ført fram. Lagt verður aftrat, at arbeiðssteðgurin hesar seinastu dagarnar, prógvar týðiliga hesa støðu.

– Hósdagin fyri eini viku síðan fingu vit so aftur ein arbeiðssteðg. Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið kundu ikki koma ásamt um nýggjan sáttmála. Arbeiðið varð niðurlagt frá tíma til tíma. Freistin hjá virkjum og privatpersónum at fyrireika seg var eingin. Um undantøk skulu gerast frá arbeiðssteðginum, er heldur ikki nakað, sum partarnir hava tosað um. Hetta verður ikki tikið upp, fyrrenn tað í veruleikanum er ov seint og alt gerst ein samráðingarspurningur.

Á heimasíðuni verður sagt, at Føroya Arbeiðsgevarafelag er av tí áskoðan, at neyðugt er at fáa ein meira skipaðan arbeiðsmarknað í Føroyum.

– Nýggj semingslóg eigur at verða dagførd. Hetta er alneyðugt, soleiðis at hon er betur egnað til at fáa semju í lag, tá partarnir ikki megna tað. Millum annað eigur ein regla at verða, sum sigur, at verkfall/verkbann ikki kann verða sett í verk fyrrenn t.d. eina viku aftaná, at semingsroyndin er miseydnað.

Lagt verður aftrat, at tað ofta eru nakrir heilt fáir lyklapersónar innan hvørt avtaluøki, sum kunnu leggja føroyska samfelagið lamið, mest sum hvørja ferð, sáttmálasamráðingar eru.

– Hetta ber stutt sagt ikki til. Einki framkomið samfelag kann liva við, at stórir partar av landinum vera avskornir, og at alt virksemi steðgar upp – eisini virksemi, sum als ikki er partur av verkfallinum, siga tey á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum.

# Kaj 2 útgáva í Klaksvík




BÓKAÚTGÁVA
*tíðindaskriv*

Í samband við at annað bindið í ævisøguni um Kaj verður útgivið verður útgávuhald í býráðshøllini í Klaksvík har bókin verður løgd fram. Høvundurin fer at siga nøkur orð og hann signerar eisini bøkur hetta kvøldið.

Tað eru 11 mánaðir millum permurnar á fyrsta og øðrum bindi av ævisøguni um Kaj Johannesen, sum nú telir 910 síður. Fyrsta bindið um Kaj kom út 24 november í fjør, annað bindið 20. oktober í ár.

Hesuferð snýr søgan fyri tað mesta seg um seinnaheimsbardaga og hvussu Kaj og hansara menn komu strevaðust undir krígnum.

Seinni heimsbardagi var ein sonn gulltíð fyri teir sum sigldu og bóru boð í bý. Aftast í bókini er eitt yvirlit yvir hvat teir, sum sigldu hjá Kjølbro vunnu í krónum og oyrum túr fyri túr í tíðarskeiðnum frá 1941-44. Eitt nú var persónliga inntøkan hjá Kjølbro í 1942 1,3 millión krónur.

Figgjadagin klokkan 16. verður útgávuhald í Miðlahúsinum í Vágsbotni, har Osmund Justinussen fer at siga nøkur orð um bókina. Høvundurin signerar bøkur.

Tað er forlagið Hellurnar, sum gevur bókina úr og hon kostar 399 krónur í bókabúðunum. Bókin kann eisini keypast beinleiðis frá forlagnum við at fylla seðilin út, sum varð sendur í hvørt hús og senda hann inn til Forlagið, tá kostar hon 349 krónur. Til ber eisini at seta seg í samband við Forlagið Hellurnar á tele-fon 223143 ella 322800. Eisini ber til at bíleggja á teldupostinum; justinus@post.olivant.fo

# Samráðingar tiknar uppaftur

*Eftir fleiri áheitanir frá fleiri pørtum, eydnaðist tað mikumorgunin hjá semingsmonnunum at fáa partarnar aftur til samráðingarborðið*



**– Partarnir sinnaðir at finna eina loysn sigur Jógvan Amonson, semingsmaður**

SÁTTMÁLASAMRÁÐINGAR
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Samráðingarnar á arbeiðsmarknaðinum millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið vórðu uppafturtiknar mikudagin klokkan 13. – Vit hava fingið uppringingar frá báðum pørtum, sum eru sinnaðir til at taka samráðingarnar uppaftur, og vit meta, at tað eru líkindi til at finna eina semju út frá tí, sum partarnir hava sagt við okkum segði Jógvan Amonson, semingsmaður fyrrapartin mikudagin. Hann leggur aftrat, at Semingsstovnurin hevur havt samband við partarnar í týskvøldið og mikumorgunin, og út frá hesum samrøðum ber til at siga, at partarnir eru sinnaðir til at finna eina loysn.

– *Tvs at tað kann gerast óneyðugt hjá løgtinginum at leggja uppí?*

– Ja, tað vil eg vóna.

– *Ber til at siga, at tað, sum skilur partarnar, er so lítið, at tað ber til at finna eina semju?*

– Tá vit taka semingsroyndina uppaftur, so er tað tí, at vit meta tað vera realistiskt at finna eina semju.

Tingfundur í gjáramorgunin var útsettur til seinnapartin, tí tað hevði eydnast at fáa partarnar aftur til samráðingarborðið. Stutt undan tingfundinum bíðaði semingsstovnurin eftir eini uppringing frá Fíggjarmálaráðnum. Tann uppringingin kom í evstu løtu, og var hon so mikið positiv, at Semingsstovnurin gjørdi av at áseta nýggjar samráðingar kl. 13 mikudagin.